

Leiðari til Fíggjar- og fyrisitingardeildina hjá ALS

# Ert tú tann rætti eyg-leiðarin

Ert tú eygleiðarin við stóra yvirlitinum og leiðarin við røttu eginleikunum? Vilt tú vera við til at mynda leiðsluna hjá ALS? So er eitt avbjóðandi starv sum leiðari á Fíggjar- og fyrisitingardeildini leyst at søkja.

Deildin umsitur alla roknskaparførslu, gerð av rakstrar- og gjaldførisætlanum, innanhýsis grannskoðan, edv-kervið, elektroniska skjalasavnið, fíggjarøkið í Barsilsskipanini og Fasta Gerðarrættinum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Seks fólk starvast í løtuni á deildini.

Høvuðsuppgávan hjá leiðaranum verður at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini. Leiðarin skal harumframt framleiða tilfar og hagtøl til stýrið fyri ALS, og í neyvum samstarvi við íløguumsitarar ansa eftir eginognini hjá ALS. Leiðarin myndar leiðsluna hjá ALS saman við stjóranum og leiðarunum á Tryggingar- og Ávísingardeildini.

Starvið er fjølbroytt við stórum avbjóðingum. Tað krevst, at tú hevur hóskandi útbúgving og royndir, umframt hollan kunnleika til føroyska arbeiðsmarknaðin og samfelagsviðurskifti sum heild. Vit leggja dent á, at tú hevur góð samstarvsevni og dugir at ganga á odda í orð og gerð. Tú mást hava evnini og yvirlitið til at útinna stórar verkætlanir í verki.

Lønin verður avtalað í samsvari við royndir og førleika. Seinasta freist at søkja starvið er tann 23. november 2006.

Umsóknir skulu stílast til Ernst Jacobsen, stjóra á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á telefon 34 95 50 ella umvegis teldupost ernst@als.fo

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 20 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

# Deildarstjóri til Frímerkjadeildina

## Uppgávan

**Vegna tað, at verandi leiðari fer frá fyri aldur, søkir Pf. Postverk Føroya eftir nýggjum deildarstjóra til Frímerkjadeildina.**

**Frímerkjadeildin er útflutningsfyritøka burturav við einum árligum umsetningi uppá 24 mió. kr. og um 30.000 viðskiftafólki kring allan heim. Á Frímerkjadeildini, ið veitir tænastur á 5 ymiskum málum, starvast um 35 fólk, ið fáast við alt frá hugskoti og sniðgeving til marknaðarføring, kundarøkt og pakking.**

**Nýggi deildarstjórin fær ábyrgdina av fíggjarliga úrslitinum á Frímerkjadeildini, og skal leggja til rættis frímerkjaútgávur, marknaðarføring og kundarøkt.**

**Umframt at geva út frímerki til nýtslu í føroyska postverkinum, er høvuðsuppgávan hjá Frímerkjadeildini at selja føroysk frímerki til savnarar uttanlands. Týðandi grein av uppgávuni er við frímerkjum og øðrum tilfari at vekja áhuga og kunnleika um Føroyar í altjóða høpi.**

**Internetið er týðningarmikið amboð í kunnandi virkseminum, og Frímerkjadeildin hevur í dag ikki færri enn 4 heimasíður. Ein er miðsavnandi portalur, meðan hinar eru evnislýsandi heimasíður, ið snúgva seg um føroyska mentan, náttúru, siðsøgu, list, bókmentur og jarðfrøð.**

## Førleiki

**Tú hevur hóskandi útbúgving og starvsroyndir, og kanst vísa á góð úrslit innan leiðslu og sølu. Framskygni er altavgerandi í starvinum, sum krevur neyva skipan av allari framleiðslu langt fram í tíðina.**

**Tú hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT, serstakliga innan *direct marketing*, og hugflog til støðugt at menna internetið sum amboð í marknaðarføringini av føroyskum frímerkjum. Dentur verður lagdur á góð samskiftisevni, málkunnleika, leiðsluroyndir, og so dugir tú eisini væl at fáast við fólk.**

## Pf. Postverk Føroya bjóðar tær

**eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í altjóða umhvørvi við tíðarhóskandi leiðsluhátti. Vit bjóða tær góða løn, ið svarar til førleika og royndir.**



Pf. Postverk Føroya




## Umsókn

**Áhugað eru vælkomin at ringja til Sofus Clementsen stjóra á tlf. 23 61 31 fyri at fyri at kunna seg um starvið. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.**

**Umsóknir við hóskandi prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi fyri 30. oktober 2006 og skulu sendast til:**

**Pf. Postverk Føroya
att: Sofus Clementsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn**

**ella um teldupostin til :
postur@postur.fo**

Postverk Føroya

**Pf. Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo**